REGLUR UM ENDURGJALD FYRI NÝTSLU AV EGNUM BILI Í TÆNASTUØRINDUM

**§1**

Starvfólk, sum javnan eru í tænastuørindum, kunnu fáa skrivliga heilmild frá stovninum at nýta egnan bil í tænastuørindum. Loyvi kann vera avmarkað í tíð, vegastrekki og koyrinøgd.
**Stk. 2.** Starvsfólk kunnu eftir avtalu í hvørjum einstøkum føri nýta egnan bil til einstøk ørindi.

**§ 2**

Endurgjaldið fyri koyring við egnum bili er 3,20 kr. fyri kilometurin.
**stk. 2**. Minsta gjadl fyri eini ørindi (tú fer og kemur aftur) er tó 16 kr.

**§ 3**

Avroknað skal verða einaferð um mánaðin.

**§ 4**

Endurgjaldið eftir § 2 er einasta gjaldið, starvsfólkið hevur rætt til, og er soleiðis til allar útreiðslur til brennievni, dekk, trygging, skaðar og annað.

**§ 5**

Hesar reglur eru galdandi fyri koyring eftir tann 1. apríl í 2007.

*Fíggjarmálaráðið tann 28. mars 2007*

*Bárður Nielsen/*

*Petur Alberg Lamhauge*